# Tekniskir snávisteinar darva 3G

**Tað gongur strilti hjá Vodafone at fáa nýggja 3G-netið at virka. Fýra støðir í Havn eru virknar, men hóast klaksvíkingar og fólk við Skálafjørðin fingu lovað 3G tøknina áðrenn jól, er skipanin enn ikki klár**




*Nýggja 3G tøknin, sum Vodafone bjóðar, er darvað av tekniskum trupulleikum. Heldur ikki er nýggja tøknin blivin tað stóra jólahittið, ið Vodafone kanska vónaði tað varð..*

FARTELEFONI
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Ein lítlan mánað undan jól komu Vodafone við boðunum, at nú fáa allir føroyingar nýggjastu tøknina innan fartelefoni, 3G. At byrja við skuldu fýra støðir í Havn senda, soleiðs at nýggja tøknin var klár at nýta beinanvegin.

Harafturat skuldu støðir á Toftum og í Klaksvík verða klárar fyri jól, men enn eru tær støðirnar ikki farnar at virka.

- Vit hava onkrar tekniskar trupulleikar har, soleiðs at støðirnar eru ikki farnar at virka enn. Men tað kann vera hvørja løtu, at tær fara at virka. Tað kann verða í dag, í morgin ella um eina viku. Tað er ikki til at siga, sigur Bjarni A. Bjarnason, stjóri á Vodafone.

Hóast Vodafone er eftir ætlanina við nýggjastu tøknini, væntar Bjarni A. Bjarnason at teirra málsetningur, at 80 prosent av landinum skulu hava nýggjastu tøknina innan ársenda, fer at halda.

- Tað er eitt sindur trupult í byrjanini, men tá vit hava fingið hesar støðirnar at virka, hava vit ein leist, vit kunnu arbeiða eftir, og tá gongur tað væntandi skjótari, sigur stjórin á Vodafone í Føroyum.

### Einki jólahitt

Tá nýggj fartelefontøkni kemur á marknaðin stutt fyri jól, plagar tað vanliga at vera gravgangur eftir at fáa nýggju tøknina. Men soleiðs hevur eftir øllum at døma ikki verið við nýggju 3G tøknini.

- Enn er tað nokk mest brúkt til breiðband. Tað eru fólk, sum mugu hava breiðband hjá sær alla tíðina, sum hava fingið sær 3G, greiðir Bjarni A. Bjarnason frá.

Sostatt er nýggja tøknin ikki blivin tað stóra jólahittið, ið Vodafone kanska ynskti, tá teir komu út við nýggju tøknini tann 1. desember í fjør.



## Skráin fyri Rás 2

### Hósdagur 15. jan.

15:00 Tíðindi
15:10 Rock-balladir
16:00 Tíðindi
16:05 Bilradio
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi
18:45 Tónleikur
21:00 Orð á leiðini
21:30 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Fríggjadagur 16. jan.

07:00 Tónleikur
08:00 Bilradio (e)
09:00 Morgunsendingin
10:05 Morgunsendingin
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsendingin
12:00 Tíðindi
12:15 Hittónleikur
13:00 Ynskiløtan – Mirjam Pætursdóttur leggur til rættis. Send eina heilsan umvegis www.ras2.fo
15:00 Tíðindi
15:10 Vikuskiftissending
16:00 Tíðindi
16:05 Vikuskiftissending
17:00 Tíðindi
17:15 Vikuskiftissending
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Tónleikasending hjá Heimamissiónini
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Leygardagur 17. jan.

07:00 Tónleikur
13:00 Bilradio (e)
14:00 Vinnurasin – Jan Müller leggur til rættis
15:00 Vinstra Víkiskilda – Barbara Holm og Tjóðhild Patursson eru vertir
16:00 Vinstra Víkiskilda
17:00 Tónleikur
21:00 Halleluja – Andrew Djurhuus og Heine Lützen leggja til rættis
00:00 Liðugt

### Sunnudagur 18. jan.

07:00 Gospel tónleikur
10:00 Úr skjáttuni (e)
11:00 Tónleikur
11:30 Á Torginum (e)
13:00 Tónleikur
20:00 Reflex (e) – Ungdómssending hjá Heimamissiónini
21:00 Kelduvaðið
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

Kristján og Heini



## Bilradio (e)

### – fríggjadagom kl. 08.00

Í sendingini verður m.a. vitjað hjá plátu- og lakkverkstaðnum Prolakk í Hoyvík, har prátað verður við stjóran Rógva Durhuus. Vitjað verður eisini á Brandstøðini í Havn, har Kristján Eiriksson og Heini Østerø presentera ein nýggjan brandbilin. Eisini verður vitjað hjá A. H. Jensen í Havn, sum m.a. selur reingeringsútgerð til bilar.

Sendingin verður endursend leygardagin kl. 13:00.

RÁS ...títt radio